# Til minnis um Vermund Joensen



Góði babba

Tað er so óveruligt, at tú ert farin - long tíð kemur fer at ganga, áðrenn eg vil viðganga, at tú er farin frá okkum.

Eg hevði glett meg so nógv til í summar, tá ið tú og mamma skuldu koma yvir at vitja okkum - vit skuldu halda gullbrúðleyp fyri tykkum.

Eg veit eisini, hvussu nógv tú hevði glett teg. Tú skundaði tær at fortelja mær, at nú hevði tú keypt billett til tann 27. august og minti dreingirnar næstan hvønn dag á, at nú kemur abbi skjótt, men Guð hevði aðrar ætlanir við tær. Túrurin hesaferð var til himmals.

Tað var so deiligt hesi seinastu árini at hava eina so smarta telefon, sum gav okkum møguleika at bara trýsta á ein knøtt, so vóru vit í køkinum hjá hvørjum øðrum. Kai Leo skuldi rópa á abba, minna abba á, at hann skuldi koma at byggja eitt træhús til hann. Hetta kemur hann ikki at skilja.

Tað gleðir meg at vita, at hvussu gott tú hevði tað hjá okkum, og hvussu tú treivst her. Tey seinastu 11 árini eg havi búð í USA, vóru vit komin nógv tættari at hvørjum øðrum. Tú hevði tað ofta betri við pínuni - haldi hitin hjáltpi so nógv - tú virkaði altíð so glaður og flenti og spældi við dreingirnar dagin langan. Vit ferðastu nógv saman, í summarhúsi og vóru nógv úti og ótu og keypti á støðum, sum tú ikki hevði gjørt heima í Føroyum, tí í SMS fór tú ikki - hetta komi eg at sakna. Sjálvt um tú ert farin frá okkum, er tú altíð tætt hjá okkum í okkara hjørtum og tankum.

Vit koma at sakna teg so nógv. Eg skal passa væl uppá mammu fyri teg. Eg elski teg.

**Dóttir tín Janita**

---

†

Kunngjørt verður fyri vinum og kenningum, at

**Jens Cramer**
Århus

andaðist mándagin 16. juni, 68 ára gamal.

Jarðarferðin verður leygardagin 21. juni klokkan 10.00 frá Vor Frue Kirke, Vestergade 21, 8000 Århus C.

**Cecilie Z. Cramer og Malan Marnersdóttir**

---

**Dagurin**
**18. juni. Leontius**, deyður umleið ár 135. Heryvirmaður í rómverska herinum, sum varð tikin av døgum fyri trúar sakir.

Lesið Sosialin -so eru tit við!

# Aftur á slóðina í Skarvanesi



*Eldri og yngri hittust á Skarvanesi at minnast aftur á gamlar dagar*

*Mynd: bkv.fo*

Hóskvøldið gjørdist hendingaríkt og søguligt, tá tvinnar familjur í fleiri ættarliðum vitjaðu Skarvanes nú um dagarnar.

Eftirkomararnir hjá Hergeir og Mariu Petersen, sum fluttu av Skarvanesi í 1974, tey fýra av systkjunum Óluva, Irena, Borgar og Gudrun við familju, eru í Føroyum og ferðast, og hava búleikast á Skarvanesi ein part av tíðini.

Malborg McLaren, sum giftist eingilskmanni, flutti til Onglands í 1945, og vitjar saman við soninum Eddi á somuleiðis á Skarvanesi í hesum døgum. 86 ára gamla Malborg er ávíkavist fastur og mostur at Liss og Jolanu, sum eisini vóru á Skarvanesi í góðveðrinum.

Hósdagurin varð serligur “aftur-á-slóðina-dagur”, har næstringar vitjaðu tey heimafturkomnu, og mong góð minnir flættaðust saman aftur hesa hendingaløtu. Byrjað varð við krabbafiskikapping, og tað stóð nógv á luttakandi liðunum, sum stríddust millum steinarnar í fjøruni.

Aftaná varð farið til búgvi borð við øllum góðum, og skyldfólkini hugnaðu sær við práti, sangi og føroyskum dansi til væl út á náttina.

Tað stóð kortini ikki á at fáa skjúts til húsa aftur hjá gestunum, tí yvirborgarstjórin á Skarvanesi, Poul Jákup, trein í trompetina, tá farast skuldi til húsa.

Nógvir træðrir eru styrktir og flættaðir saman aftur, hesar dagarnar tá tey á Skarvanesi funnu aftur á slóðina.

**sb.**




MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin